

*Western Cove og Thetis við bryggju á Sundi. Tey skulu nú gera áhugaverdar kanningar fyri Amerada Hess í føroyskum øki. Mynd kalmar*

*Amerada innrás:*

# Oljufelagið Amerada Hess leggur til brots

*Leygardagin kom seismikkskipið Western Cove á Sund. Saman við Thetis skal tað royna eitt heilt nýtt slag av seismikki á føroyskum øki. Mikukvøldið taka 10 umboð fyri oljufelagið Amerada Hess ímóti umleið 50 gestum á Hotel Hafnia. Felagið fer at brúka nógva orku uppá kanningarnar av føroysku undirgrundini.*

Jan Müller

Skulu vit døma eftir vitjanunum av útlendskum oljufeløgum í Føroyum hetta seinasta árið, so má sigast, at áhugin fyri føroysku undirgrundini og trúgvin uppá, at her finst bæði olja og gass í stórum nøgdum, er stórur.

Statoil, Mobil, Enterprice, Texaco, Conoco, BP, Shell, Esso, Saga, Fina, Mærsk Olie og Gas, Deminex, Union Texas, Dong, Lasmo, Norsk Hydro, Amoco og Amerada Hess eru bert nøkur av nøvnunum, sum higartil vitja Føroyum árs.

Nú tað er loyvt øllum at gera forkanningar á føroyskum øki og nú tað stundar móti fyrsta útbjóðingarumfarinum á føroyskum øki tykist áhugin bara at vaksa. Feløgini royna saman og hvør í sær at útvega upplýsingar, sum kunnu seta júst tey í bestu støðu ná aðrenn lisensirnir verða býttir út.

## Amerada Hess í oddinum

Eitt av feløgunum, sum tykist at vilja vera við í oddinum í hesi kappingini er tað amerikanska oljufelagið Amerada Hess.

Felagið hevur í eina tíð arbeitt saman við trimum øðrum oljufeløgum við tí fyri eygað at leita eftir olju og gassi á føroyskum øki. Hesi eru Dopas, Lasmo og Norsk Hydro.

Felagið metir møguleikarnar at finna olju í føroyskum øki vera so góðar, at tað hevur biðið amerikanska seismikkfelagið Western um at gera eina rættiliga umfatandi og tøkniliga sæð spennandi kanning á føroyskum øki. Brúkast skulu tvey skip til hesa roynd. Danska sjóverjuskipið Thetis er annað og hitt er Western Cove, sum kom á Sund leygardagin.

Skipini fara hesa vikuna og tá næstu við at skjóta seismikk á útvaldum økjum kring oyggjarnar. Tað nýggja við hesi ætlan er tað, at tey koma at arbeiða saman soleiðis at ein kann fáa meira burtur úr enn um talan var um bert eitt skip.

## Stór samkoma mikukvøldið

Fyri at vísa at talan er ikki bert um tøknifrøði og kanningar men eisini um menniskju og samarbeiði hevur leiðslan í Amerada Hess sent ikki færri enn 10 av sínum starvsfólkum til Føroya at kunna politikarar, vinnulívsfólk, pressuna o.o. um tað, sum felagið arbeiðir við.

Mikukvøldið verður samkoma á Hotel Hafnia, har umboð fyri Amerada Hess fara at hitta umleið hálvthundrað innbodnum og greiða teimum frá arbeiðinum og ætlanunum á føroyskum øki. Millum Ameradafólkini er eisini Richard Hardmann, sum er kanningarstjóri hjá felagnum í Europa.

Andy Mitchel, tíðindastjóri hjá Amerada Hess, sigur við Sosialin, at teir seta stórar vónir til teir komandi dagarnar, bæði hvat viðvíkur seismisku kanningunum á føroyskum øki men eisini høvinum at hitta føroyingar.

– Vit prioritera Føroyar høgt í okkara kanningararbeiði og tað er okkara vón, at okkurt fer at spyrjast burtur úr royndunum at leita eftir olju og gassi í føroysku undirgrundini.

Hann greiðir frá, at Amerada Hess hevur saman við seismikkfelagnum Western Geophysical og lærda háskúlanum í Cambridge gjørt eina ætlan fyri seismikkkanningar á føroyskum øki. Endamálið er at finna útvegir fyri at koma ígjøgnum basaltflákarnar. Úrslitið av hesum kanningunum, sum verður klárt rættiliga skjótt, verður so eisini tøkt hjá øðrum oljufeløgum. Tað fer at geva øllum pørtum, eisini føroyskum myndugleikum, eitt betri innlit í jarðfrøðina her um leiðir.



*Richard Hardmann kanningarstjóri og Mike King, sum arbeiðir við kanningunum á føroyska økinum. Mynd jan*



variant
viðfestivognar á goymslu
Eykalutir, útgerð, søla og service. Bið um brochurur og prislista.
Kaj Andreasen & Co.
Box 1200 - Tlf. 15600

REINT VATN REINAN SJÓGV!
ALT INNAN SÓTTREINSAN
• UV ANLEGG
• SANDFILTUR
• MSO FILTUR
Royn okkum fyrst
P/F BLIKKSMIDJAN
Box 138 Tlf. 55579
700 Klaksvík Fax 57163